## Tiknir fyri barnaporno

Løgreglan í Íslandi hevur tikið tveir menn, sum eru settir í samband við tað stóra málið um barnaporno, sum Europol hevur avdúkað. Sambært íslendskum fjølmiðlum hevði annar maðurin 24.000 myndir og 800 kykmyndir við barnapornografiskum tilfari í teldu síni. Í telduni hjá hinum manninum fann løgreglan umleið 1.000 barnapornografiskar myndir. Sum skilst hava teir báðir íslendingarnir ikki keypt barnapornografiskt tilfar frá tí avdúkaða kervinum.



## Shakespeare í Grønlandi

Um vikuskiftið hevði Silamiat-leikhúsið í Nuuk frumframførslu av tí kenda Shakespeare-sjónleikinum ”Macbeth”. Makka Kleist er einasti leikari á pallinum, tí hon leggur kropp og rødd til allar leiklutirnar í leikinum. Framførslan er á grønlendskum máli, og hetta er fyrstu ferð, at Shakespeare hevur ljóðað á grønlendskum á palli. ”Macbeth” varð týddur til grønlendskt í 2002, og sambært KNR riggar Shakespeare væl á grønlendskum.

# okkara



*Næmingarnir í skúlanum síggja fram til dagin, tá útbyggingin er liðug*

*Mynd: Høgni Thomsen*

longri tíð enn annars neyðugt, og av hesi orsøk verða arbeiðini eisini dýrari, staðfestir Kristian.

Var talan hinvegin um eina størri høll, hevði tað verið nærum ógjørligt at flutt tey stóru elementini norður gjøgnum tunlarnar. Tá hevði verið neyðugt at flutt tilfarið við farmaskip.

### Eykastríð

Arbeiðið uppá skúlan á Fossánesi byrjaði herfyri og hevur gingið eftir ætlan. Mett verður at tað kostar einar 7 mió krónur.

Talan er um ein nýbygning sunnanfyri verandi skúla, har ein skal útvega sær fleiri skúlastovur. Ein partur av hesum arbeiðinum er at leggja dekk-elementini í.

Eisini í hesum arbeiðinum møta teir avmarkingum og forðingum: Hesi stóru elementini eru ikki nakað, sum ein bara fær soleiðis uttan víðari norður á Fossánes.

- Hesi skulu førast gjøgnum tunlarnar við stórum bilum. Hóast tað altso ber til, er talan um eitt eykastríð hjá okkum.

- Alt, sum vit skulu brúka og sum krevur serligan flutning, - tja, tað er bara ikki sum at siga tað, viðgongur Kristian.

### Forðingar í arbeiðinum

Tá eitt størri byggiarbeiði skal gerast, verður altíð mett um kostnaðin av tí.

Soleiðis varð eisini gjørt við útbyggingini av skúlanum her á Fossánesi. Men aftrat hesum má ein írokna ein hægri prís, orsakað av samferðslumøguleikunum ella -forðingunum, um ein heldur vil.

- Tað er ilt at siga í krónum og oyrum, hvussu nógv hetta eykastríðið dýrkar eitt arbeiði. Men tað er ein ávísur munur, slær hann fast.

Ein fyritøka í Klaksvík hevur kortini ein slíkan serbygdan stoypibil, sum sleppur gjøgnum tunlarnar.

Kristian og hansara menn hava givið eitt fast tilboð uppá útbyggingina, og hann heldur ikki at hetta arbeiðið er so kostnaðarmikið.

- Men ein verður allatíðina forðaður í arbeiðinum, tí tú ikki fært alt flutt á staðið á henda hátt, staðfestir hann.



*Teir eru fleiri til arbeiðis hjá Kristiani*

*Mynd: Høgni Thomsen*





*Hermann Fuglø hevur longu smíðað fleiri hús, men er nú í læru sum timburmaður*

*Mynd: Høgni Thomsen*

# Umborð við bori í hond

**Gamalt var ikki at fara í læru, tá ein er komin væl upp í tey 40. Hermann Fuglø í Norðdepli er tó eitt undantak. – Eg havi altíð ynskt at verða timburmaður, sigur hann**

LÆRLINGUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fossánes:** Ein skal bara ganga eftir ljóðinum, fyri at koma fram til staðið har handverkararnir eru.

Hamarsløgini gella í bygninginum, sum teir hjá Kristiani Jacobsen eru í ferð við at gera sunnanfyri skúlan á Fossánesi.

Millum teirra er 47 ára gamli Hermann, sum hevur smíðað fleiri hús frammanundan. Hann hevur longu lært í eitt ár í fyritøkuni.

- Tað tekur fýra ár at læra til timburmann. Kanska eg fái eftirgivið nakað av tíðini, sigur hann við Sosialin.

### Á sjógvi og landi

At arbeiða sum timburmaður hevur higartil ikki verið lívsstarvið hjá Hermanni.

Hann hevur fyri tað mesta verið til skips, men fleiri arbeiðsskaðar umborð, og lítil hjálp til at koma fyri seg aftur, hava gjørt sítt til at hann nú fór í læru.

Hann hevur millum annað siglt við ísfiska- og saltfiskaskipum, trolarum undir Føroyum, Íslandi og Eysturgrønlandi, og var eisini onkran túrin í Loynikrókinum.

> *Kanska eg fái eftirgivið nakað av tíðini*
> (Hermann Fuglø, lærlingur)

Heilt frá barnaárum hevði Hermann hug at arbeiða sum timburmaður, og hann hevur longu smíðað fleiri hús, men er nú altso í læru sum slíkur.

Ætlan hansara er í fyrsta umfari at fáa sær tey neyðugu pappírini sum timburmaður. Neyvan átti at staðið á at fáa arbeiði sum slíkur, soleiðis sum búskaparliga gongdina er í samfelagnum í løtuni.

Hvat fer at henda, tá hann stendur við lærubrævinum í hondini, tað vil tíðin vísa:

- Sjólívið, tað kann man so altíð fara aftur til, um ein følir seg nøkulunda, sigur hann.